**Formula-deildin**

| | |
|---|---|
| B36 – GÍ | Páll Augustinussen |
| VB/Sumba – HB | Dagfinn Olsen |
| NSÍ – EB/Streymur | Ransin N. Djurhuus |
| B71 – Skála | Jens P. Brattalíð |

**1. deild menn:**

| | |
|---|---|
| B68 – HB | Jens P. Brattalíð |
| ÍF – TB | Jón Kári í Brekunni |
| KÍ – B36 | Bárður Mortensen |
| NSÍ – FSV 04 | Jóannes Mikkelsen |
| SÍ – LÍF | Vinjard Dam |

## GÍ og KÍ spæla steypafinalu

Fyri nøkrum vikum síðani spældu bestu kvinnuliðini hjá KÍ og GÍ seg í steypafinaluni eftir sigrar á ávikavist B36 og AB í hálvfinalunum. Um vikuskiftið tørna GÍ og KÍ so saman í steypafinaluni, sum verður spæld á vøllinum í Leirvík leygardagin kl. 13.00. Eingin ivi er um, at kvinnurnar úr Klaksvík eru stórfavorittar at vinna dystin, men GÍ hevur fyrr givið KÍ ein skarpan gang. Í eini steypafinalu kann at kalla alt henda, og tí er ikki óhugsandi, at GÍ-kvinnurnar enn einaferð fara at leypa ein hvøkk á KÍ.

# Kanónumfar er á skr

**Rembingarnar eru ógvusligar, og ansurin er stórur fyri hesum umfarinum, sum ber sera spennandi avbjóðingar við sær**

15. UMFAR
*Jákup Mørk*

Tað kemur sjáldan fyri, at tað eru so nógvur dynamikkur og turbolensur kring eitt umfar í Formula deildini, sum tað er hesa ferð. Fýra dystir eru á skránni. Tann fimti og ikki minst áhugaverdi verður ikki fyrrenn mikukvøldið, tá ið illa stadda KÍ fer at taka ímóti AB, sum er niðanfyri strikuna.

Oddaliðið úr NSÍ fær vitjan úr Sundalagnum, og tað er oddasessurin, sum stendur upp á spæl. Fyrr í summar tapti NSÍ í Streymnesi. Talan var um tepurt tap, og teir í Runavík vildu halda, at teir ta ferðina høvdu betri uppiborið. Hugburðurin tóktist tó at vera, at tapið var at liva við.

Síðani tá er nógv broytt. Tað hevur gingið sum eftir ánni hjá NSÍ. Í 50. ári felagsins kennist møguleikin fyri at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð at vera nærri veruleikanum, enn hann nakrantíð áður hevur verið. Spælið er farið at líkjast, liðið skapar málmøguleikar, teir halda tætt í verjuni, og fram um alt tykist kenslan av, at tað, sum ongantíð áður hevur borið til, fer at bera til, at gera seg alt meiri galdandi.

Í EB/Streymi hevur tað ikki gingið so væl, síðani teir høvdu vitjan av NSÍ. Ketan er ikki so væl smurd, og onkra ferðina hevur hon havt hug at hoppa heilt av. Saknurin í Sorin Anghel, sum nú sigst vera við at koma fyri seg, hevur verið ógvusligur, og liðið hevur eisini liðið undir, at Arnbjørn Hansen ikki enn er komin upp í snúningarnar, sum hann vísti í fjør.

### GÍ í Gundadali

B36 er undir liðini á NSÍ, og B36 hevur møguleika at leggja seg einsamalt á toppin, um teir í árstalsfelagnum vinna á GÍ, og um NSÍ samstundis snávar hesa ferð.

Mikukvøldið fekk B36 rættuliga luft undir veingirnar. Avrikið ímóti grannunum og meistarunum var sannførandi, og spurningurin var bara, hvussu stórur sigurin skuldi verða. Trivaligur sigur á HB ber sjálvandi við sær, at sjálvsálitið er í toppi hjá B36, og Kurt Mørkøre er meistari í at fáa sínar menn at gera tað, sum skal til.

Tað verður tó neyðugt hjá B36 at spíla seg út. Hesa ferð vitjar GÍ. Gøtumenn eru rættuliga komnir fyri seg. Avrikið á Skála var fínt, og góða úrtøkan seinastu vikurnar ber við sær, at GÍ fer í Gundadal at fáa



## Við – ikki við

Allir tøkir

Skaddur: Hanus Clementsen (knæskaði)

Ivasamur: Sorin Anghel (knæskaði)
Við aftur: Ronnie Samuelsen (eftir leikbann)

Leikbann: Hans Pauli Petersen
Ikki tøkur: Sámal Joensen (vøddaskaði), Hans Jørgen Djurhuus (knæskaði)
Ivasamur: Sverri Jacobsen og Tomasz Sajdak

# NSÍ hevur takið á E

Toppdysturin í Formuladeildini hetta vikuskiftið verður við Løkin í Runavík, tá NSÍ tekur ímóti EB/Streymi. Hyggja vit eftir dystunum millum liðini tey síðstu 10 árini, so er tó einki, sum bendir á, at hesin dysturin skal liva upp til krøvini sum ein toppdystur oftast setir. NSÍ hevur nevniliga havt sera gott tak á EB/Streymi á heimavølli, og bert einaferð av seinasta sjey møtunum hevur EB/Streymur fingið fult við Løkin, meðan NSÍ hevur vunnið allar hinar dystirnar.